


NORRÖNA

*Norröna skal sigla alt árið til Hirtshals*

# HANSTHOLM HARMAST

**SMYRIL LINE** Birgitte Juhl, havnastjóri, staðfestir, at tað er eitt stórt afturstig fyri Hanstholm, at Norrøna fer at sigla til Hirtshals í framtíðini

Uni Holm Johannesen

Birgitte Juhl, havnastjóri í Hanstholm, harmast.

- Vit eru ikki vónbrotin. Men vit harmast avgerðina hjá Smyril Line, slær hon fast.

Smyril Line kunngjørdi mikudagin, at Norrøna fer at sigla til Hirtshals í framtíðini.

Ferðamannaskipini hjá føroyska felagnum hava siglt til Hanstholm síðan 1983.

### Missa eina rúgvu

Hanstholm er ein fiskivinnubýur við gott og væl 2300 íbúgvum.

Umframt fiskivinnuna, so hevur ferðavinnan verið ein støðug inntøka hjá býnum. Men nú hevur ferðavinnan fingið ein frammaná.

Ferðafólkini, sum vóru við Norrønu, fara ikki longur at keypa í Hanstholm, og tað fer at merkjast, sigur Birgitte Juhl.

- Tað verður minni virksemi á havnini, og vit missa pengarnar, sum ferðafólk plaga at leggja eftir seg í býnum. Avgerðin hjá Smyril Line er eitt stórt afturstig fyri Hanstholm, men vit ræðast ikki at bretta upp ermar, greiðir havnastjórin frá.

Hon vil ikki siga stórvegis um, hvussu tey fara at handfara trupulleikan.

- Men vit hyggja at ymsum møguleikum, sigur hon.

### Var fyrireika

Birgitte Juhl sigur, at hon var fyrireikað upp á tíðindini, sum komu í gjár.

Danskir og føroyskir fjølmiðlar hava skrivað, at tað var stórur møguleiki fyri, at Hirtshals verður framtíðarhavnin hjá Norrønu í Danmark.

Tí kom tað ikki óvart á.

- Vit hava samstarvað væl við Smyril Line og hava als ikki beiskan smakk í munninum, sigur Birgitte Juhl.

### Broyta ikki ætlanir

Havnin í Hanstholm er fyri stórum broytingum í løtuni.

Ætlanin er, at havnin skal verða minst tvífalt so stór í 2015.

Birgitte Juhl vísir á, at ætlanin fevnir um eina íløgu á stívliga eina milliard krónur.

- Ætlanin er ikki broytt, hóast Norrøna fer nú til Hirtshals, sigur Birgitte Juhl.

Útbyggingin fer eisini at verða gagn fyri fiskivinnuna, sum fevnir um 70 prosent av inntøkunum hjá havnini.

Útbyggingarætlanin umfatar havnarlagið, sum fær neyðugar hentleikar, umframt orkuframleiðslu.

Gongst sum ætlað, verður Hanstholm havn hin fyrsta í heiminum, sum á bryggjumúlunum framleiðir streym úr alduorku.

## Gleðir seg til samstarvið

Fjord Line og Smyril Line fara at samstarva og brúka somu havn í Hirtshals.

Ingvar Fardal, umboðsstjóri í Fjord Line, sigur í stuttari viðtalu við boarding.no, at Fjord Line gleði seg til samstarvið Smyril Line.

Fjord Line byrjaði at sigla til Hirtshals í fjør.

- Samstarvið hevur við sær, at Smyril Line hevur somu atgongumøguleikar til havnina í Hirtshals sum Fjord Line. Vit fáa fíggjarligan vinning burtur úr avtaluni, sum økir okkara møguleikar í kappingini við onnur, sigur Ingvald Fardal.



## Hirtshals er besta loysnin

Rúni Vang Poulsen, stjóri á Smyril Line, sigur, at tað er greiður fyrimunur fyri felagið, at Norrøna fer at sigla til Hirtshals í framtíðini.

Hann sigur, at havnin í Hirtshals er veðurgóð og ferðafólkavinalig.

- Túrurin verður eisini tríggjar tímar styttri, og vit spara pengar, tí skipið nýtir minni olju, vísir stjórin á.

Men flyta tit bara fyri at spara pengar?

- Nei. Tað er ein stórur síðuvinningur. Vit spara pengar, umframt at umstøðurnar eru betri, sigur Rúni Vang Poulsen.

Smyril Line boðar frá í tíðindaskrivi, at tað er ein liður í menningini av felagnum og tillaging av rakstrarútreiðslum, at Hirtshals verður framtíðarhavnin hjá Norrønu í Danmark.

Fyrimunirnir eru millum annað, at fleiri býir eru nærhendis, sum Hjørring, Frederikshavn og Aalborg. Somuleiðis er lætt at ferðast til og úr Hirtshals, tí vegaog toksambandið er avbera gott.

Rúni Vang Poulsen vil ikki siga, at Smyril Line missir stórvegis við at flyta úr Hanstholm til Hirtshals.

- Hanstholm missir ein stóran part av sínum virksemi, men fyri okkara viðkomandi, so er hendan loysnin bara ein fyrimunur, sigur Rúni Vang Poulsen.